## Ræðast munn- og kleyv



Grísaslaktaríið í Ringsted varð fyribils latið aftur, tí illgruni var um munn- og kleyvsjúku. Føðivøruøkið Eystur lat um miðdagin slagtaíið aftur, tí illgruni var um sera smittandi sjúkuna í einum grísi. Seinni í dag verður tikin støðá til, um slagtaríið kann lata upp aftur ella framhaldandi skal verða stongt. Tað er vanligur framferðarháttur at steingja slagtaríir, tá illgruni er um munn- og kleyvsjúku.

## Lána minni

Vikuliga lyklatalið fyri umsóknir hjá amerikanum um realkreditlán heldur fram at falla. Hesaferð er fallið 19,2% móti 22,6% vikuna undan. Gongdin er tengd at, at amerikanski húsamarknaðurin er trýstur av fallandi prísum, samstundis sum tað er trupult at fáa húsalán frá lánistovnunum. Amerikanski húsamarknaðurin er í teirri løgnu støðu, at hóast tjóðarbankin, Fed, setur rentuna niður, fylgir fastfrysta rentan á bústaðarlánum ikki við. Hetta merkir, at fastrentan sambært Bloomberg er á sínum hægsta støði síðani oktober, og tað bøtir ikki um hugin at keypa bústaðir, skrivar Børsen.

# Seinni nýbygningurin liðug

**Fyrra skipið hjá Thor í Hósvík, sum varð latið eigarunum leygardagin, var nakað seinni liðugt enn ætlað, men seinna skipið, sum skal yvirtakast 14. september, verður sambært fyrisitingarleiðaranum á Skála Skipasmiðju væntandi latið til tíðina**

SKIPASMÍÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skipasmíð er aftur vorðið ein partur av føroyskum handverki.

Tá ið Thor Alpha varð navngivin og latin eigarunum á Skála seinasta leygarmorgun, nýttu bæði stjórin á skipasmiðjuni, Eyðfinn Egholm og reiðarin, Hans Andrias Joensen, høvi at takka Landsfelag Handverkaranna fyri vælvild í sambandi við pólsku handverkararnar, sum hava gjørt og framvegis gera stálarbeiði á Skála.

Eyðfinn Egholm vísti á, at felagið hevur skilt tann týdning, sum slíkar verkætlanir hava fyri samfelagsbúskapin og segði seg vóna, at góða samstarvið fer at halda fram.



*Dánjal Andreassen er fyrisitingarleiðari á Skála Skipasmiðju*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hans Andrias segði, at felagið hevur gjørt tað møguligt at fáa handverkarar úr útlandinum at gera stálarbeiði.

- Tit eiga saman við táverandi landsstýri eina serstaka tøkk fyri, at hetta gjørdist møguligt, segði reiðarin.

### Seinna skipið

Dánjal Andreassen, fyrisitingarleiðari á Skála Skipasmiðju, sigur, at meðan byggingin av Thor Alpha var nakað seinkað, bendir alt á, at tíðarætlanin við seinna skipinum, sum Thor letur smíða á Skála, fer at halda.

- Seinni nýbygningurin verður ætlandi liðugur um ólavsøkutíð, og tá fer hann – eins og hesin fyrri – av landinum til sandblásingar, metalisering og málingar.

Thor Alpha var í Assens í Danmark, har hetta arbeiði varð gjørt, men enn er ikki tikin avgerð um, hvar seinna skipið fer.

- Tað veldst um, hvørji tilboð vit fáa, leggur Dánjal aftrat.

Sosialurin var á Skála, tá ið sáttmálin um seinna nýbygningin varð undirskrivaður í matarhøllini á skipasmiðjuni. Tá varð eitt sindur gjørt burtur úr, at Thormenninir, sum sigast at vera góðir fullveldismenn, vildu hava yvirtøkudagin at verða 14. september, og hetta er eisini tað, sum stendur í sáttmálanum.

- Jú, málið er, at seinni nýbygningurin verður latin eigarunum 14. september, og alt bendir á, at tíðarætlanin fer at halda, sigur fyrisitingarleiðarin.

Thor Alpha og nýbygningurin, sum stendur í byggihøllini á Skála, eru systirskip. Teir eru 55 metrar langir og 13 metrar breiðir.





### 56 póllendingar

Dánjal Andreassen sigur, at í løtuni eru umleið 140 mans í arbeiði á Skála Skipasmiðju, harav 56 póllendingar. 12 av hesum komu mánadagin í hesi vikuni.

- Eg haldi, at skipanin við pólsku handverkarunum virkar væl. Menninir arbeiða hjá okkum í einar tríggjar mánaðir í senn. Síðan fara teir heimaftur, og nýtt fólk kemur í staðin. Teir, sum eru her heima, tá ið høgtíð stundar til, fara vanliga heim at halda frí og koma so aftur, tá ið høgtíðin er av.

Hann sigur, at flestu handverkarar, sum einaferð hava verið á Skála, koma oftast aftur, tá ið tíðin gongur, og teir sambært skipanini kunnu koma aftur higar.

- Vit eru stak væl nøgdir við hesar menn og tað handverk, sum teir gera fyri okkum, sigur Dánjal.

Vit spurdu eisini fyrisitingarleiðaran, um aðrir byggisáttmálar eru væntandi hjá Skála Skipasmiðju



*Seinna skipið, sum Thor í Hósvík letur smíða á Skála Skipasmiðju, er systirskip til Thor Alpha, sum um nakrar dagar stevnir í Meksikanska Flógvan*

*Mynd: Skála Skipasmiðja*